# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bert er bróðurleyst bak

Bert er bróðurleyst tak sigur orðatakið. Orðatakið rennur til hugs, nú brøðratjóðin fyri vestan hav, Ísland, er komin í størstu fíggjarligu trupulleikar nakrantíð. Í kjalarvørrinum á fíggjartrupulleikunum koma inflatión, peningatap og ótryggleiki, og frændur okkara eru mest sum tiknir á bóli. Mangir íslendingar kenna seg sviknar og illa viðfarnar av ábyrdarleysum og grammum banka- og fíggjarmonnum. Atfinningarnar móti stjórn og tjóðbanka tróta heldur ikki, og beiskleikin móti íslendsku altjóða peningaspekulantunum er stórur.

Tað er lætt at vera eftirklókur og møguliga hava íslendski tjóðbankin og fíggjareftirlitið verið í so eftirlætin og givið peningarstovnunmu og leiðslum teirra ov leysar teymar. Hinvegin er tað gott og gleðiligt at kunna staðfesta, at tann skaðafrøði yvir íslendska sorgarleikin, ið hómast í pørtum av europeisku pressuni og almennu viðmerkingunum, ikki er komin fyri í Føroyum. Vit harmast og kenna djúpa samkenslu við frændatjóðini, ið er rakt av eini fíggjarligari vanlukku, sujm rakar alt samfelagið og skaðar tað sera góða umdømið, sum Ísland hevur havt í altjóða samfelagnum.

Vit fegnast um, at løgmaður hevur sent íslendsku stjórnini samhugafjarrit, tí her er talan um tjóð-skaparliga vanlukku fyri frændatjóðina.

Íslendska stjórnin hevur roynt alt, ið roynast kann til tess at bjarga fíggjarkervinum og harvið bjarga samfelagsbúskapinum. Hetta er eingin lættur setningur. Í hesum er íslendska stjórnin í somu skóm sum so mangar aðrar stjórnir. Tiltøkini hava í stóran mun verið tey somu, eitt nú almennar yvir-tøkur av privatum peningastovnum og at tryggja peningakervinum gjaldføri. Hetta er trupult, tí flestu lond hava sama trupulleika, og tí íslendka krónan alt fyri eitt kom undir eitt trýst sum ikki hevur sín líka.

Danmark hevði í byrjanini av kreppuni sama trupul-leika og kundi tí ikki nýta rentulækking sum kreppu-tiltak. Ísland hevur ikki sama møguleika og tí hevur krónan mist helvt av virðinum við ógvusligum fylgjum.

I altjóða fíggjarkreppuni eru vit heppin at kunna kroka undir danska hjálparpakkanum, sum fólkatingið samtykkir í dag. Føroyska bankakervið og harvið føroyska samfelagið stendur nú tryggari í sambandi við hóttandi altjóða fíggjarkreppuna sum Jóannes Eidesgaard landsstýrismaður sigur. Hetta merkir, at føroyskir peningastovnar nú eru tryggjaðir móti skaðiligari spekulatión, sum kundi gjørt, at peningur hevði verið fluttur av landinum. Vit fegnast yvir, at Føroyar soleiðis hava fingið møguleikan at hóðra undan. Vit harmast við íslendingum um støðuna í landi teirra. Og vit ivast ikki í, at teir við tí dugnaskapi, treysti og arbeiðssemi, ið eyðkennir frændir okkara, fara at vinna á trupulleikunum.

**Sosialurin**

## Tveykantaða heimsmyndin hjá Árna Dahl



**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður

| | Fólkatalið | | Index 1870=100 | |
|---|---|---|---|---|
| | Føroyar | Ísland | Føroyar | Ísland |
| 1870 | 9.990 | 70.000 | 100 | 100 |
| 1918 | 20.300 | 91.600 | 203 | 131 |
| 1944 | 29.000 | 126.000 | 290 | 180 |
| 2008 | 45.500 | 313.400 | 455 | 448 |




Árni Dahl hevur skrivað eina politiska viðmerking til nýggju ABC-samgonguna við heitinum "Um 365 ár". Innihaldið í greinini hjá Árna er ómetaliga einfalt:

**1.** Orsakað av "sambandi" er ongin fólkavøkstur í Føroyum, og tjóðin "er dømd at doyggja sum frá líður".

**2.** Orsakað av "frælsi" er stórur fólkavøkstur í Íslandi og tjóðin blómar.

Árni er so fullvísur í síni tveykantaðu heimsmynd, at hann loypir heilt út av tromini: taka vit ikki loys-ing, kunnu vit akkurát tað sama kunnu leggja okkum at doyggja. Ella við hans-ara egnu orðum:

"Eitt kunnu vit gera okkum púra greitt: Vit kunnu seta í verk kanning-ar, vit kunnu halda ráð-stevnur, vit kunnu skipa fyri "Job-match", sum tey rópa hetta á nýføroyskum. Vit fáa ongantíð, ongantíð unga ættarliðið heim aftur at byggja upp eitt ófrælst samfelag. Eitt samfelag, sum dúvar upp á samband og olmussu, er dømt at doyggja, sum frá líður".

"Ongantíð, ongantíð"!
"Dømt at doyggja"!
Kann tað vera rotnari og svartari?

Sum prógv fyri síni tveykantaðu søgufatan vísir Árni til gongdina í fólkatalinum í Føroyum og Íslandi frá 1870 til nú.

Lat okkum so hyggja at søguligu gongdini. Fyrst 1870, tí tað hevur Árni sjálvur sett sum byrjunarár. Síðani 1918, tí tá fekk Ísland fekk fullveldi – júst ta skipan sum føroyska fullveldissamgongan hjá Anfinn og Høgna 1998-2003 stríddist fyri. So 1944, tá Ísland gjørdist sjálvstøðugt ríki. Og so at enda støðan í dag.

Nú er íslendska fólkatalið 6 ferðir størri enn okkara, so fyri at kunna samanbera gongd-ina, kunnu vit umframt veruligu tølini seta fólka-talið í báðum londum til index 100 í 1870.

Í stabbamynd sæst samanberiliga gongdin í indextølunum enn týðuligari.

**Av myndini er lætt at lesa:**

• At í tíðarskeiðnum 1870-1918, meðan Føroyar og Ísland vóru í somu ríkis-rættarligu støðu, vaks fólkatalið nógvar ferðir meir í Føroyum enn í Íslandi. So neyvan hevur ríkisrættarliga støðan havt nakrað ávirkan á ymisku gongdina í londunum báðum.

• At í tíðarskeiðnum 1918-1944, meðan Føroyar vóru eitt danskt amt og Ísland hevði fullveldi, vaks fólkatalið nógvar ferðir meir í Føroyum enn í Íslandi. Tó fara vit – sjálvandi - ikki at konkludera, at ríkisrættar-ligari støðan var tann av-gerandi faktorurin: at tað var nógv gagnligari fyri fólkatalið at vera eitt danskt amt enn eitt fullveldi.

• At í tíðarskeiðnum 1944-2008, meðan Føroyar hava sjálvstýri í ríkisfelagsskapi við Danmark, og Ísland er sjálvstøðugt ríki, veksur fólkatalið nógv meir í Íslandi enn í Føroyum. Skulu vit so nú siga tað - mótvegis lærdóminum frá undanfarnu tíðarskeiðunum – at nú er ríkisrættarliga støðan altavgerandi fyri menning og vøkstur í fólkatali? Og ikki hugsa um, at eftir annan heimsbardaga tók ídnaðar-liga kollveltingin dik á seg, har náttúruskaptar fortreyt-ir góvu íslendsku ídnaðar-menninigini eitt ókeypis og nærum óavmarkað tilfeing-isgrundarlag – samanborið við okkara kargu grunnar og dýrtkeyptu orku?

Øll sjálvstøðugt hugs-andi fólk vita tað, at slík tveykantað svart-hvít heimsmynd, sum hendan hjá Árna Dahl og øðrum tjóðveldisfólkum, er primi-tiv avbrongling av politiska veruleikanum. Hann er aldrin so einfaldur svart-hvítur, aldrin so steinrunn-in í fundamentalistiskar dogmur. Tíbetur er veru-leikin meira samansettur, meira fjølbroyttur, og gevur rúm fyri frábrigdum og nógvum ymiskum møguleikum fyri politisk-um atgerðum fyri at røkka felags málum. Júst tað sum eisini eyðkennir pluralisti-ska ástøðið undir fram-komnum fólkaræði.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.